

– Sum heild vísa føroysktlærugreinin og Føroyar seg sum ein trygdarhavn, ið flestu næmingar knýta at ætt og familju, men næmingarnir vilja hava lærugreinina nútímansgjørda, sigur Vár í Ólavsstovu

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

atvoldin til, at føroyskir næmingar hava fatað føroyskt sum eina turrisliga lærugrein, ið ikki var líka spennandi sum danskt. Í kanningini hjá Vár í Ólavsstovu kemur greitt til sjóndar, at næmingarnir enn halda lærugreinina vera gamaldags og siðbundna, og teir vilja fegin hava, at lærugreinin verður nútímansgjørd. Teir sakna modernitet og víðskygni.

Vár í Ólavsstovu staðfestir, at hvat nyttu viðvíkur, halda næmingarnir ofta danskt vera eitt týdningarmiklari mál enn føroyskt, tí fleiri teirra ætla sær undir framhaldandi lestur í Danmark. Hinvegin hevur føroyskt eina nógv sterkari støðu sum lærugrein, hvat teirra samleika viðvíkur, og næmingarnir »siga frá heitum kenslum og áhuga fyri lærugreinini,« sum Vár í Ólavsstovu málber seg. Hetta er ein mótsøgn. Næmingarnir kenna seg heima í føroyskum, men lærugreinin er ikki nóg forvitnislig og tíðarhóskandi.

Tær heitu kenslurnar fyri føroyskum, heldur Vár í Ólavsstovu, eru týðiligt tekn um, at føroyskt er ikki bara ein lærugrein í máli, men ein samleikalærugrein, sum er persónliga, ættarliga, sosialt og tjóðarliga grundað. Næmingarnir hava í sambandi við hennara kanningar sagt frá positivum kenslum mótvegis føroyskum, ið ikki samsvara við tað, teir í roynd og veru uppliva í lærugreinini í gerandisdegnum. Hetta kann tulkast sum eitt slag av skyldu, ið næmingarnir kenna mótvegis føroyskum, heldur hon.

## Kjølfest í føroyskum

Í ritgerðini vísir Vár í Ólavsstovu eisini á, at næmingarnir sakna samrøður og meira tvívegis samskifti í undirvísingini í føroyskum. Undirvísingin er nógv merkt av, at samskiftið er einvegis, at næmingar verða yvirhoyrdir, og lærararnir skriva upp á talvuna. Hetta hevur við sær, at næmingarnir hava ilt við at gjøgnumskoða, hvat endamálið við undirvísingini í grundini er. Kortini eru teir trúgvir ímóti føroyskum. Vár í Ólavsstovu skrivar:

»Skyldan og óttin fyri, at føroyska málið doyr út, eru rættiliga vanligar kenslur millum studentaskúlanæmingar. Tey eru ítøkiliga bangin fyri, at føroyskt skal hvørva, og tað er rættiliga vanligt, at tey eru ímóti, at fremmandaorð verða tikin upp í føroyskt. Nógvir næmingar siga tað vera eina týðandi uppgávu at arbeiða ímóti ávirkan frá danismum og amerikanismum, samstundis sum ein minniluti upplivir, at føroyskt er ov afturlatið fyri upptøku av fremmandaorðum, og at ov nógv orka verður brúkt at gera nýggj føroysk orð.«

Mótsetningarnir millum danska statin og føroysku tjóðina hevur søguliga elvt til, at føroysktlærugreinin hevur verið eitt politiskt stríðsmál millum føroyskar sjálvstýrispolitikarar øðrumegin og føroyskar samríkispolitikarar og danskar ráðharrar hinumegin. Enn tann dag í dag verða føroyskt og danskt sett hvørt upp ímóti øðrum, tá talan er um tímabýti og fakligt innihald. Alt hetta hevur gjørt føroyskt til ein hugsjónarligan stríðsspurning. Men nú er nakað nýtt hent.

»Við tíðini er hent eitt paradigmuskifti í hesum spurningi,« skrivar Vár í Ólavsstovu, sum eisini spurdi næmingarnar um teirra politisku støðu. »Samríkisvongurin vísir í spurnarskemakanningunum, at føroyskt er bæði tað persónliga og stovnsgjørda móðurmálið, og teirra tjóðskapur er traditiónsfestur og knýttur at Føroyum. Hetta stendur í greiðum mótsetningi til tann upprunaliga diskursin á hesum økinum, har danskt og Danmark umboðaðu hesi viðurskifti.«

Síðan skrivar hon: »Fyri sjálvstýrisvongin er tjóðskapur í stóran mun hugsjónarliga grundaður, og hann inniheldur statsmyndan sum eitt grundliggjandi aðalmál. Tey lýsa ikki nevniverda skyldu mótvegis føroysktlærugreinini og føroyskum máli. Tey vísa á, at fyri tey er nýtímansgerð av føroysktlærugreinini sera týdningarmikil, um hon skal hava nakra framtíð fyri sær og fyri, um hon skal hava nakra vælvild millum næmingar.«

Eitt eru allir næmingar tó samdir um, skrivar Vár í Ólavsstovu: »Felags fyri allar næmingar er, at Føroyar og føroysktlærugreinin vísa seg at vera trygdarhavnin, sum tey altíð kunnu venda aftur til, og sum gott er at falla aftur á, um útheimur og tað fremmanda eru ov beisk og trupul og tey fakligu krøvini ov høg og ov trupul at fáa tamarhald á. Sum heild vísa føroysktlærugreinin og Føroyar seg sum ein trygdarhavn, ið flestu næmingar knýta at ætt og familju.«

> Felags fyri allar næmingar er, at Føroyar og føroysktlærugreinin vísa seg at vera trygdarhavnin, sum tey altíð kunnu venda aftur til